## Robinho fer heim til Brasil

Við einum príslepa upp á £32 milliónir varð roknað við, at Robinho skuldi verða bjartasta stjørnan av øllum, sum eru keyptar til Manchester City, síðani felagið í fyrraárið fekk nýggjar eigarar. Veruleikin hevur verið ein annar, tí hóast glottar, so hevur Robinho ongan tíð av álvara vunnið hjørtuni hjá ljósabláu áskoðarunum. Nú er greitt, at Robinho næstu seks mánaðirnar skal spæla við Santos í heimlandinum, og Roberto Mancini, sum er manager í Manchester City, vónar, at hetta er tað, sum skal til fyri at fáa fótbóltsevnini at blóma aftur. - Robinho er ein spælari, sum hevur tørv á at spæla støðugt fyri besta liðið, og vit ynskja honum alt tað besta hesar komandi seks mánaðirnar, sigur Mancini við enska Soccernet.



## Fýra dystir til Ferdinand

Rio Ferdinand hjá Manchester United er dømdur leikbann í fýra dagar, eftir at videomyndir sýndu, at hann sló Craig Fagan, tá Manchester United leygardagin spældi móti Hull. Í fyrstu atløgu mótmælti spælarin ætlaða bannið, og tí kundi hann vera við, tá United basti grannunum úr City í hálvfinaluni í Carling-Cup. Men nú fall hamarin, og tað er dyggur smeitur hjá Manchester United, har tey annars júst fegnaðust um, at Ferdinand var tøkur eftir langan skaðasteðg.

# Toppdystur í Trongis-vági

**Eydnast TB at vinna á SÍ sunnudagin, minkar munurin millum tey bæði fremstu kvinnuliðini í Eik-liguni niður í tvey stig. Eisini hjá monnunum er toppdystur, tá SÍ í morgin tekur ímóti Mjølnir**




Hilmar Jan Hansen

Eftir dystirnar í Eik-liguni hjá kvinnum um vikuskiftið kann støðan broytast munandi, tí tá verða stigini býtt í helvt. Tann stóri munurin, sum hevur verið í báðum endum, verður ikki so stórur, so tí kveikjast óivað vónir um bata hjá fleiri av liðunum.

Hesa ferð er toppdystur á skránni í Trongisvági, har TB tekur ímóti SÍ, sum hevur verið á odda alla kappingina. TB, sum hevur vunnið síðstu seks landskappingardystirnar á rað, hevur ikki tapt síðani síðsta dyst ímóti SÍ, sum var hálvan november. Eydnast TB at taka oddaliðið, kann tað broyta stigatalvuna munandi, tí so eru bara tvey stig á muni, eftir at stigini eru koyrd í helvt.

Mjølnir, sum roynir at fylgja við TB í jagstranini eftir einum FM-finalusessi, skal á útivølli spæla ímóti KÍF, ið enn eigur fyrstu stigini til góðar. Og Fleyr, sum hevur tapt tríggjar teir síðstu landskappingar- og steypadystirnar, skal royna at reisast aftur, nú ÍF vitjar.



TB-kvinnurnar eru til reiðar at taka ímóti oddaliðnum, SÍ, í Trongisvági sunnudagin. Í morgin er eisini toppdystur hjá monnunum, tá SÍ og Mjølnir spæla í Sørvági

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### SÍ er eftir Mjølnir

Í Eik-liguni hjá monnum eru stigini langt síðani býtt í helvt, so skal munurin minka millum liðini, kann tað bara gerast á vøllinum. Hetta umfarið er tað serliga í toppdystinum í Sørvági millum SÍ og Mjølnir leygardagin, at tað kann fáa týdning. SÍ, sum síðstu dystirnar hevur verið í framgongd, skal royna at koppa oddaliðnum úr Klaksvík, tí við sigri til heimaliðið minkar munurin niður í eitt stig – og vinnur Mjølnir, økist munurin upp í fimm stig.

Samstundis liggur Fleyr og lúrir aftanfyri, men óstøðuga havnarliðið tykist tó vera í so langt aftanfyri, og í løtuni er finalusessurin nakað fjarur. Hesa ferð tekur Fleyr á heimavølli ímóti ÍF, sum enn einki stig hevur fingið.



Kollfirðingar eru annað av teimum báðum einastu liðunum, sum hava koppað suverena Neista-liðnum í vetur. Sunnudagin møtast Neistin og KÍF aftur

Mynd: Álvur Haraldsen

# VB berjist fyri lívinum

**Seks stig eru upp til bjargingina, nú VB-kvinnurnar aðru ferð á rað skulu spæla yvirlivilsisdyst. Og hjá monnunum ganga fimm av teimum seks liðunum framvegis í einum bólki – langt aftan fyri Neistan**




Hilmar Jan Hansen

Bæði í 2003 og 2005 átti VB besta kvinnuliðið í Sunset-kappingini, umframt at VB eisini hevur verið í fimm av 10 teimum síðstu steypafinalunum. Men tær glæsiligu løturnar standa í skríggjandi kontrasti til núverani støðuna á stigatalvuni, har VB er niðast – heili seks stig aftan fyri StÍF og VÍF.

VB hevur nú bara átta dystir eftir, og dysturin á Skála sunnudagin er ein av teimum, VB undir ongum umstøðum má tapa. Samstundis er StÍF í tí støðu, at verður vunnið á VB hesa ferð, er niðurflytingarvandin mestsum ruddaður burtur.

Í hinum báðum kvinnudystunum eru tey bæði oddaliðini, Stjørnan og Tjaldur, at rokna sum stórfavorittar, hóast bæði eru á útivølli. VÍF, sum hevur havt viðrák síðstu vikurnar, tekur ímóti Stjørnuni, og Neistin, ið enn situr rimmarfast á bronsuplássinum, fær vitjan av Tjaldri.

### Ganga í einum bólki

Síðstu vikurnar hava ikki verið tær stóru broytingar í Atlantic Airways-kappingini. Bara eitt stig er millum nummar tvey og nummar seks, og skiftandi úrslitini hava gjørt, at liðini bert hava flutt seg innanhýsis, men einki er sloppið frá hinum.

KÍF, sum leingi lá aftast, er saman við H71 eitt stig framman fyri hini trý aftaru, sum eru VÍF, StÍF og Kyndil. Hesa ferð skulu kollfirðingar á útivølli spæla ímóti Neistanum, ið er níggju stig frammanfyri. KÍF hevur fyrr í vetur vunnið á Neistanum, so nú fæst at síggja, um tað var eitt »lucky punch«, ella um KÍF kann gera tað óvæntaða aftur.

H71 spælir longu í morgin ímóti StÍF, sum hevur tapt síðstu fimm dystirnar. Strandingar hava ikki vunnið, síðani teir hálvan november vunnu á júst hoyvíkingum. Triði dysturin er gamli klassikarin millum VÍF og Kyndil, og endar hann ikki við javnleiki, er væl hugsandi, at tað framvegis verður bara eitt stig millum fimm tey fremstu, tá vikuskiftið er farið afturum.